## Írland krevur umdyst

Írska fótbóltssambandið krevur umdyst millum Írland og Frakland, eftir at Thierry tvær ferðir hevði hondina á bóltinum, áðrenn hann spældi William Gallas frían til málið, ið sendi Fraklands til HM-endaspælið. – Hetta skaðar umdømi hjá fótbóltinum, og vit heita á FIFA um at skipa fyri einum umdysti, sigur írska fótbóltssambandið. Landsliðsvenjarin hjá Írlandi, Giovanni Trappatoni, heldur tað vera skeivt, at spælast skal tvær ferðir eitt korter, tá tað stendur á jøvnum í slíkum avgerandi dystum, tí tað verður ov stórur fyrimunur fyri tað liðið, sum er á heimavølli.



## Reint »fótbóltskríggj«

At fótbóltur kann vera annað enn bara eitt spæl, skilst á øllum brøgdum, nú reint »fótbóltskríggj« er brostið á millum Egyptaland og Algeria. Ófriðurin eftir teir báðar dystirnar millum londini um eitt atgongumerki til HM í Suðurafrika, hevur Egyptaland kallað sendiharra sín í Algeria heim. Egyptar leggja sum grund tað, teir kalla algerisk álop á egyptarar og egyptisk áhugamál í bæði Algeria og Sudan, har avgerandi dysturin var spældur mikukvøldið. Egyptaland, sum tapti at enda, hevur nú tikið seg úr norðurafrikanska fótbóltssamstarvinum.

# Spennandi grannauppgerð

**Dysturin millum Neistan og Kyndil í morgin kann geva ábendingar um, um Kyndil veruliga hevur meldað seg uppi í oddastríðið, har Neistin hevur gingið undan higartil**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Tað skerst ikki burtur, at óivað er stórur áhugi fyri grannauppgerðini í Atlantic Airways-kappingini millum Neistan og Kyndil í morgin. Neistin hevur verið á odda higartil, men hevur nú fingið StÍF undir liðina á sær, umframt at Kyndil andar tey bæði í nakkan.

Strandingar skulu í sínum lagi sunnudagin til Vestmanna at vitja eitt VÍF-lið í kreppu, og í Hoyvíkshøllini verður spurningurin svaraður sunnudagin, um KÍF vinnur fyri triðju ferð, ella um H71 framvegis skal hanga uppi í teimum fremstu.



Hans Áki Dal-Christiansen og hinir í Kyndli hava havt gott tak á síðstu dystirnar og bjóða nú oddaliðunum av

Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Kappingin sundur

Í oddastríðnum í Sunset-kappingini sær Neistin ikki út til at megna at fylgja við Tjaldri og Stjørnuni, og dysturin í morgin, sum verður á heimavølli ímóti Tjaldri, er ein hin síðsti kjansurin at fáa gjørt nakað við tað. Men alt bendir á, at kvinnukappingin longu er togað sundur.

Stjørnan skal sunnudagin til Vágs at spæla ímóti VB, sum hevur fingið ringastu byrjanina í áravís og enn einki stig hevur vunnið. Hinvegin er dysturin í Vestmanna sunnudagin millum VÍF og StÍF dysturin millum tey bæði liðini, ið síggja út til at vera niðara miðjan í vetur – og møguliga tvey av trimum liðum, sum skulu stríðast ímóti niðurflyting.

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Tjaldur | 7 | 7 | - | 0 | - | 0 | 227 | 161 | 66 | 14 |
| 2 Stjørnan | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 208 | 146 | 62 | 12 |
| 3 Neistin | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 176 | 163 | 13 | 8 |
| 4 StÍF | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 139 | 173 | -34 | 4 |
| 5 VÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 158 | 214 | -56 | 2 |
| 6 VB | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 123 | 174 | -51 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 217 | 188 | 29 | 10 |
| 2 StÍF | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 198 | 188 | 10 | 10 |
| 3 Kyndil | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 188 | 188 | 0 | 8 |
| 4 H71 | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 177 | 177 | 0 | 6 |
| 5 VÍF | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 194 | 197 | -3 | 4 |
| 6 KÍF | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 163 | 199 | -36 | 4 |

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

21/11 13.30 Neistin-Tjaldur
22/11 14.30 VÍF-StÍF
22/11 15.00 VB-Stjørnan

**Atlantic Airways-kappingin**

21/11 15.00 Neistin-Kyndil
22/11 16.00 VÍF-StÍF
22/11 16.00 H71-KÍF

### Flogbóltur

**Eikligan, kvinnur**

20/11 18.30 Fleyr-KÍF
22/11 14.00 TB-Dráttur
22/11 15.00 KÍF-SÍ
22/11 16.00 Fleyr-Mjølnir

**Eikligan, menn**

21/11 14.00 Mjølnir-Fleyr
22/11 14.00 ÍF-SÍ

### Fótbóltur

**U21: EM-undankapping**

22/11 14.00 Andorra-Føroyar

# Finalupláss upp á spæl

**Tað liðið, sum eftir vikuskiftið er á odda í Eikliguni hjá kvinnum, hevur samstundis vunnið sær pláss í steypafinaluni. Alt peikar á, at SÍ-kvinnurnar fara við tí**

Tá dystirnir í Eikliguni hjá kvinnum um vikuskiftið eru farnir afturum, hava øll liðini spælt eina ferð ímóti hvørjum øðrum. Reglurnar siga, at oddaliðið tá kemur beinleiðis í steypafinaluna.

Sum tað sær út í løtuni, liggur SÍ best fyri at vinna finaluplássið, tí sunnudagin spæla sørvágskvinnur ímóti KÍF, sum er avgjørda botnliðið higartil.

KÍF spælir annars longu í kvøld á útivølli ímóti Fleyr, sum sunnudagin aftur hevur heimavøll ímóti Mjølnir. Fjórði dysturin um vikuskiftið er í Trongisvági millum TB og Drátt.

Mest áhugaverdi dysturin er óivað tann millum Fleyr og Mjølnir, tí hesi bæði liðini eru tey, ið royna at fylgja við SÍ. Fleyr hevur spælt ein dyst minni enn Mjølnir, so sunnudagurin er avgerandi fyri, hvat teirra situr á øðrum plássi.



Kvinnurnar hjá SÍ hava undan dystunum um vikuskiftið longu annað beinið í steypafinaluni

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Eingin tekur Mjølnir

Enn eru trý umfør eftir – dystirnir um vikuskiftið íroknaðir – áðrenn kappingin í Eikliguni hjá monnum er komin so mikið langt, at nakað lið vinnur seg beinleiðis í steypafinaluna.

Men áðrenn komið verður so langt, eru altso fleiri sett og stig at spæla um. Í morgin tekur oddaliðið Mjølnir ímóti Fleyr, og tá fær ÍF vitjan av SÍ.

Einki bendir á, at nakar tekur Mjølnir, áðrenn steypafinaluplássið skal avgerast, men Fleyr skal fáa gongd á nú, skal liðið ikki detta burtur ímillum. Somuleiðis krevur ÍF at fáa síni fyrstu stig, og so er spurningurin, um SÍ ikki er ov sterk mótstøða til, at tað skal henda longu nú.

**hil**

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 0 | 15 | 10 |
| 2 Mjølnir | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 8 |
| 3 Fleyr | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 6 |
| 4 TB | 5 | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 5 Dráttur | 5 | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 6 ÍF | 6 | 1 | - | 5 | 3 | 15 | -12 | 2 |
| 7 KÍF | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 SÍ | 6 | 4 | - | 2 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 3 Fleyr | 6 | 2 | - | 4 | 13 | 12 | 1 | 4 |
| 4 ÍF | 6 | 0 | - | 6 | 0 | 18 | -18 | 0 |

## Svínakrím, nei takk!

Flogbóltssambandið tekur nú síni fyrivarni, so svínakrímssmittan ikki skal breiða seg millum spælararnar, venjarar og dómarar, ið ikki longur mugu taka í hondina á hvørjumøðrum, tá teir heilsast undan og eftir dyst.

Í skrivi til øll feløgini mælir Flogbóltssambandið nú frá, at spælarar, venjarar og dómarar taka í hondina á hvørjum øðrum í sambandi við dystir, sum annars hevur verið vanligt. Hetta, fyri at minkast skal um vandan fyri svínakrími millum flogbóltsfólkini.

– Hetta verður steðgað beinanveg og verður ikki tikið upp aftur, fyrr enn onnur boð verða givin, sigur nevndin í Flogbóltssambandinum, ið heitir á øll umboðsfólk um at kunna bæði spælarar, venjarar, dómarar og øll onnur um hetta stigið.

At mælt verður frá, at tikið verður í hondina á hvørjumøðrum, merkir tó ikki, at tað ikki er loyvt at heilsa, men Flogbóltssambandið mælir til, at í staðin verður eitt nú »nikkað, vinkað ella tosað«.

**hil**